Per Stehr, stjóri í Maersk Contractors:

– Vóni at tað eisini verða aðrar uppgávur

Lítil ivi er um, at danska Maersk Contractors felagið fær uppgávuna at bora í Lopra. Um so verður, so fer felagið at gera alt fyri at fáa føroyingar í arbeiði eitt nú til upplæring umborð á boripallum hjá felagnum. Felagið vónar, at tað eisini verða aðrar uppgávur í føroyskum øki í framtíðini.

Jan Muller

Hjá danska oljufelagnum Maersk Contractors (Drilling) eru teir sera væl nøgdir við, at teirra felag hevur fingið lítið upp í hendi uppgávuna at bora í Lopra. Hóast okkurt skal fáast uppá pláss attrat, so er undirskrivað "a letter of intent" millum Danop og Maersk. Hetta er eitt slag av fyribils avtalu. Í tí stendur, at ein tegin vil samráðast um ein sáttmála.

Maersk fyritøkan tykist satsað so nógv uppá boringina í Lopra, at hon fyri umleið einum mánað síðani keypti ein landsboripall í Skotlandi.

Mikkel Nielsen, sølustjóri hjá Maersk Contractors sigur við Sosialin, at teir hava ikki bert keypt pallin við Føroyum fyri eygað, men tað er eisini til at fáa venjing í at bora á landi í Danmark í sambandi við, at teir skulu gera eina royndarboring har. Hann váttar, at hetta eru fyrstu ferð, at teir bora á landi í Europa.

Boripallurin kostar umleið 20 mill. kr. Teir vóna, at fáa fleiri uppgávur á landi í framtíðini. Lopra verður so fyrsta veruliga royndin.

Upp á fyrispurning um hvat Maerk hevur í hyggju at brúka føroyska arbeiðsmegi í Lopra sigur Mikkel Nielsen, at tað verður gjørt í tann mun hetta er gjørligt. Annars hava Maersk og Dopas tosað um at bjóða føroyingum arbeiði umborð á boripallum hjá Maersk, soleiðis at teir har kunnu fáa neyðugu venjingina at takast við slíkt arbeiði.

Vit spurdu Mikkel Nielsen, um tað er so, at teir hava ynski um at vera við í menningini av eini føroyskari oljuvinnu.

Tað vilja vit fegnir svarar hann, men hetta haldi eg, at tit áttu at tosað við Maersk Olie og Gas um eisini.

Stór avbjóðing

Vit fingu eisini orð á sjálvan stjóran í Maersk Contractors, Per Stehr.

Hann vónar, at tað fer at eydnast at fáa boruppgávuna í Lorpa, sum hann metir sum eina rættuliga spennandi avbjóðing.

Per Stehr vónar eisini, at henda fyrsta uppgávan hjá teimum í Føroyum kann hava við sær, at teir eisini kunnu fáa aðrar uppgávur í framtíðini.

Hava vit útgerðina ella kunnu skaffa hana til at bora úti á djúpum vatni við Føroyar, so er tað eisini nakað, sum hevur okkara áhuga. Maersk hevur drúgvar royndir við at bora á sjónum kring allan heimin.

Vit spurdu Per Stehr, um hann metir avtaluna millum Føroyar og Danmark um at danskar fyritøkur skulu hava fyrimun eru tær kappingarførar hevur havt nakað at siga í hesum føri, teir nærum hava fingið boruppgávuna í Lopra?

Fáa vit hesa uppgávu, so er tað av kommerciellum orsøkum og ongum øðrum. Vit hava verið við í eini útbjóðingarrundu, og vit eru valdir til at vera við í endasamráðingunum. Eg trúgvi heldur ikki, at Danop fer at geva okkum hvørki fleiri pengar ella størri frælsi enn onnur feløg, sum hava bjóðað.

Hvat heldur Per Stehr um møguleikan at raka við olju og gass undir boringini.

-Tað mugu tit tosa við Danop um, men tað hevði sjálvandi verið gott fyri Føroyar, um har var olja ella gass.

-Fáa tit hesa uppgávuna, sær tú so fyri tær, at tað fer at verða økt samstarv millum Maersk og føroyingar í framtíðini?

-Tað er givið, at fáa vit hesa uppgávuna, so fer tað at hava nógv annað við sær. Tað er so eisini altíð ein fyrimunur at verða fyrstur, tí tú leggur til brots í slíkari nýggjari vinnu. Í tann mun hetta er gjørligt fara vit eisini at leggja stóran dent á at taka føroyska arbeiðsmegi við.

Í dag arbeiða 4000 fólk hjá Maersk Contractors kring allan heimin. Teir umsita ikki minni enn 50 boripallar, harav 17 eru á landi.

Ritgerða- og savningarkapping 1996-97:

Skrivið um stórhvalaveiði

Stórhvalaveiði er heitið á nýggju ritgerða og savningarkappingini hjá Fróðskaparsetrinum

Stórhvalaveiði fór fram í Føroyum frá 1893 til 1984. Av hvalastøðum er nú bert við Áir eftir. Hvalabátur er eingin. Kortini eru tað fleiri menn, sum enn minnast ta tíðina, tá ið føroyingar skutu hval. Tað eru teir, sum arbeiddu á hvalastøðunum, og teir, sum sigldu við hvalabátunum.

Kappingarevnið er stórhvalaveiði í Føroyum sum heild. Hugsað verður til dømis um spurningar sum hesar:

1. Eitt yvirlit yvir hvalastøð við manning í teimum ymisku tíðarskeiðunum
2. Ognarviðurskiftini á teimum ymisku hvalastøðunum.
3. Eitt yvirlit yvir hvalabátar við manning í teimum ymisku tíðarskeiðunum
4. Ognarviðurskiftini á teimum ymisku hvalabátunum
5. Arbeiðið umborð á hvalabátunum
6. Arbeiðið á hvalastøðum við at fáa hvalirnar til holdar og at fáa nyttu burtur úr teimum
7. Amboðini á hvalastøðunum
8. Hvussu stórhvalatvøst varð selt føroyingum til matna
9. Hvør í útheiminum keypti tað, sum kom burtur úr stórhvalaveiðini
10. Annað av áhuga

Freistin at senda inn tilfar til hesa kapping er sett til **1. juli 1997.**

Ráðið fyri Fróðskaparsetrið velur dómsnevnd at meta um innkomna tilfarið og býta út virðisløn fyri bestu úrslitini. – Setrið tekur sær rætt til at tjóðprenta burtur úr øllum innkomnum tilfari til varðveitslu í søvnum sínum.

Ritgerða- og savningarkappingin 1994-95 um **jarðir og jarðanøvn** er longd við freist til **1. august 1996.** Gjølligar upplýsingar eru at fáa á Fróðskaparsetrinum.

Judokapping

Í samband við at 25 ár eru liðin síðani Havnar Judofelag varð sett á stovn, verður stór staklingakapping, fyriskipað í Eysturskúlanum í Havn

leygardagin 2. mars kl. 14.00

Kappast verður í øllum aldurs- og vektbólkum.

Havnar Judofelag

Sera billigt at
LEIGA
SJÓNVARP
Bert frá kr. 199,-
Allar støddir 20–26"
EINKIDEPOSITUM
RING 19544
RADIO VERKSTAÐIÐ w/ Gutterm Mortensen
Lýðarsvegur 15 - Tórshavn

Betri

at taka tað róliga
rff

Umboðsmannaval

Samb. § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval mánadagin 25. mars 1996.

Veljast skulu trý umboð fyri Miðvág og eitt umboð fyri Sørvág.

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera Sjúkrakassanum í hendi 05.03. 1996

Vága Sjúkrakassi